# ALMENNAR TREYTIR FYRI SØLU AV OLJU OG OLJUÚRDRÁTTUM



## 1. NÝTSLA

Sp/f Krafta (skrás. nr. 8209), Áarvegur 14, 2. hædd, 100 Tórshavn, Føroyar ("Seljari") selur og veitir ella syrgir fyri, at selt og veitt verður olja og oljuúrdráttir til keypara, og keypari keypir, tekur ímóti og rindar Seljara fyri hesar vørur.

Hesar Almennu Treytir fyri Sølu ("Almennu Treytirnar") skulu við gildi frá 15. juni 2025 ("Gildisdagurin") vera galdandi fyri allar slíkar sølur av olju og oljuúrdráttum. Uttan so, at annað er skrivliga avtalað millum Seljara og Keypara, skulu hesar Almennu Treytirnar ganga fram um allar treytir og viðurskifti, ið Keypari hevur tilskilað, lagt við ella víst til í síni bílegging ella aðrastaðni.

## 2. GÓÐSKA AV SKIPAOLJU

Oljan og oljuúrdráttirnir, ið verða seld, skulu vera við teirri dygd av bunkerolju, dieselolju til skip, gassolju til skip og av øðrum úrdráttum (tilsamans "Olja"), sum Seljari ella aðrir veitarar bjóða fram tá og har, sum veitingin verður veitt av Seljara ella øðrum veitara ("Veitari"). "Olja" fevnir eisini um øll ymisk sløg av diesel, gassolju, smyrjievni, tungari olju og øðrum úrdráttum og/ella tænastum, ið Seljari bjóðar til sølu. Keypari hevur alla ábyrgd av vali og góðkenning av Olju, herundir eisini at tryggja, at Oljan hóskar saman við oljuni, sum hon evt. skal blandast saman við. Keypari kann kanna Oljuna, áðrenn hon verður pumpað úr landi, bili ella prámi.

Uttan so at annað verður upplýst keypara skrivliga, skulu upplýsingar um eginleikar av Olju á einum stað ikki skiljast sum ásetingar um góðsku men einans sum vegleiðing. **SELJARI TEKUR ONGA ÁBYRGD AV OG INNISTENDUR HELDUR IKKI FYRI GÓÐSKU, SØLUBÆRI, NÝTILIGHEIT ELLA HENTLEIKA AV OLJUNI TIL NAKAÐ ÁVÍST ENDAMÁL UTTAN TAÐ, SUM NEVNT ER Í HESUM BROTINUM.

## 3. NØGDIR

Nøgdirnar skulu vera tær, sum keypari bíleggur til viðkomandi havnir, treytað av, at Seljari váttar at kunna veita viðkomandi nøgdir. Nøgdin av Olju verður ásett eftir máting við t.d. tangamáti ella oljumátara, alt eftir, hvat Veitarin ella Seljarin velja. Uttan so at myndugleikar krevja annað, verður nøgdarkorrigering orsakað av broytingum í hita gjørd samsvarandi API/ASTM-IP Petroleum Measurement Standards (Talvurnar 6B, 24B ella 54B, alt eftir havnaøki). Vatn- og ikki-petroleumsleivdir yvir 1% verða drignar frá, tá Veitari ella Seljari máta Oljuna. Keypari kann vera til staðar við góðkendum umboði, meðan mátað verður, men um hann ikki er til staðar, verða mátingarnar hjá Veitara ella Seljara roknaðar sum galdandi. Allar veitingar eru treytaðar av, at olja við viðkomandi góðsku er tøk í viðkomandi havn.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

## 4. PRÍSUR OG AÐRAR ÚTREIÐSLUR

Uttan so at annað er avtalað skrivliga, er prísurin fyri Oljuna tann fastsetti søluprísurin galdandi fyri viðkomandi Olju á veitingarstaðnum, tá veitingin byrjar. Keypari skal eisini gjalda øll viðkomandi avgjøld, toll og allar kostnaðir, sum skuldu verið roknað við í fakturan frá Seljara. Um skipið hjá keypara ikki tekur ímóti veiting, skal keyparin endurgjalda Seljara fyri tap, sum Seljari skuldi havt av hesum. Eisini ber keyparin í slíkum førum váðan fyri at flyta viðkomandi olju aftur til seljara, fyri goymslu av henni og fyri sølu til aðra síðu av henni, umframt av møguligum tapi av vinningi, sum stendst av hesum. Seljari hevur rætt til at krevja endurgjald frá keypara fyri útreiðslur av at flyta Olju aftur til Seljara, tá olja ikki kann verða veitt keypara orsakað av viðurskiftum, sum Seljari ikki hevur ávirkan á. Keypari skal eisini endurgjalda Seljara fyri tap, sum stendst av bíðitíð, um veiting verður seinkað.

Prísurin, sum Seljarin ásetir, er galdandi fyri tann veitingardagin og tann veitingarstaðin, sum framgongur av skrivliga tilboði Seljarans til keypara. Seljari hevur onga skyldu til at veita Oljuna, um skipið hjá keyparanum ikki er klárt at taka ímóti Oljuni tann veitingardagin og á tí veitingarstaðnum, sum eru avtalaði millum partarnar. Um skipið hjá keyparanum ikki kemur tann veitingardagin og til tann veitingarstaðin, sum er avtalaður, hevur Seljari rætt til at slíta søluavtaluna millum partarnar uttan aðra ávaring, og hevur harumframt rætt til at krevja endurgjald á sama hátt, sum um talan var um eina avbestilling frá keyparanum.

Tá Olja, sum er ætlað til eksportnýtslu, og sum er innflutt uttan at vera toll-deklarerað e.l., er veitt fyri keyparans rokning, uttan at keyparin samstundis hevur goldið møgulig viðkomandi avgjøld, skatt, kostnað ella aðrar útreiðslur, sum hava samband við hetta, heruppií rentur, hevur keypari skyldu til at endurgjalda Seljara ella Veitara fyri allar slíkar útreiðslur.

Um príseftirlit verður ásett, hava Seljari og Veitari ikki skyldu til at veita Olju, um mest loyvda gjaldið fyri Oljuni tá verður lægri enn áður avtalað gjald millum Seljara og Keypara.

Keypari hevur skyldu til at endurrinda Seljara og Veitara fyri allan kostnað, sum Seljarin og Veitarin hava ella fáa um keypari brýtir ella annars ikki fylgir ásetingunum í pkt. 5 beint niðanfyri.

## 5. NOMINERINGAR

Keypari skal boða Seljara frá í minsta lagi sjey (7) dagar frammanundan, at hann ynskir veiting, og skal tá upplýsa navn á skipi, navn á agentinum hjá skipinum, umleið nær veitingin ynskist, hvar og hvussu veitingin ynskist, og slag og nøgd av Olju, sum ynskist veitt. Keypari ella agentur keyparans skulu boða Seljara ella Veitara frá í minsta lagi 48 tímar frammanundan um navn á skipinum, neyva nøgd og slag av Olju, sum ynskist, og júst hvar og nær Oljan ynskist at verða veitt. Keypari váttar at endurgjalda Seljara ella Veitara fyri eykaútreiðslur, sum hesir hava orsakað av, at keypari, starvsfólk hansara ella agentar keyparans ikki geva Seljara ella Veitara nevndu boð innanfyri freistirnar, sum nevndar eru í hesi grein, ella um keypari avlýsur.

**Krafta Energy**
Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

Um keyparin av sínum eintingum partvíst ella heilt avlýsur eina nominering, hevur Seljari í øllum førum rætt til at krevja eitt avlýsingargjald fyri útreiðslur orsakað av avlýsingini. Um keypari ikki avlýsur nomineringina, og skipið ikki er til staðar, har avtalað er, at Veiting skal fara fram, hevur Seljarin rætt til duput avlýsingargjald umframt endurgjald fyri tær útreiðslur annars, sum Seljari ella Veitari hava av, at skipið ikki kom í havn til avtalaða tíð.

## 6. VEITINGAR

Skip verða bunkrað, tá ið tað ber til. Hvørki Seljari ella Veitari ábyrgdast fyri bíðitíð ella fyri tap orsakað av, at tað ikki slepst framat í viðkomandi havn, ella tá ið Veitarin metir, at tað ikki er møguligt trygt at bunkra skipið. Veiting verður gjørd í vanligari arbeiðstíð uttan so, at annað er avtalað og annars loyvt í viðkomandi havn. Um so er, skal keypari endurrinda Seljara ella Veitara allar eykaútreiðslur, ið standast av at veita Oljuna uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Um eitthvørt alment loyvi krevst fyri at kunna veita Oljuna, verður ongin Olja veitt, fyrr enn slíkt loyvi er útskrivað til antin keypara ella Veitara, alt eftir hvør skal hava slíkt loyvi.

Um keypari ikki er førur fyri at taka ímóti allari nøgdini av Olju, sum er bíløgd ex terminal, hevur Seljari rætt til at krevja keypara eftir tí evt. tapinum, sum stendst av, at Seljarin evt. verður noyddur at selja vøruna sum eina minni verda vøru ella fyri ein lægri prís, enn hon skuldi seljast keyparanum fyri. Um keyparin er atvold til seinkingar hjá Veitaranum til at veita Olju, hevur keyparin skyldu til at gjalda Veitaranum fyri demurrage sambært teimum takstum, sum veitarin nýtur í slíkum førum, og at endurrinda Seljara ella Veitara allar aðrar beinleiðis útreiðslur, sum teir skuldu havt orsakað av hesum.

Veiting av Olju verður til eina og hvørja tíð gjørd sambært ásetingunum í kunngerð nr. 84 um bunkring, flutning av olju o.a., dagfest 2. juli 2010 við seinni broytingum.

Um keypari biður um hetta, kann veitingin verða veitt frá bunkringsstøð á havnalagnum, har goymsla, sum Veitarin hevur, er. Hvørki Seljari ella Veitari ábyrgdast fyri nakran skaða ella nakra seinking, sum er íkomin orsakað av viðurskiftum, sum teir ikki hava ávirkan á, ella sum sloppist kundi verið undan, um keyparin í allar mátar hevði røkt sína skyldu.

Seljari hevur rætt til at steðga oljuveiting í ávísum havnum uttan nakra skyldu mótvegis keypara.

## 7. OGNARRÆTTUR OG TAPSVÁÐI

Allar Veitingar skulu vera mettar at vera framdar til fulnar, og ognarrætturin fer yvir til keypara, tá Oljan er komin fram til flansan, sum bindur saman veitingarslanguna, sum Veitarin kemur við, við móttøkuopið hjá keypara, og haðani frá heldur ábyrgdin hjá Seljara ella Veitara uppat, og keypari yirtekur alla ábyrgd fyri tapi, skaða og fyri at Oljan versnar ella dampar burtur. Oljan verður pumpað fyri ábyrgdina hjá Seljara ella Veitara einans fram til nevnda flansa, og hereftir hava hvørki Seljari ella Veitari ábyrgd av nøkrum tapi ella nøkrum skaða.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

## 8. SKYLDA AT HALDA SELJARA OG VEITARA SKAÐAFRÍAR

Keypari skal halda Seljara og Veitara skaðafríar og skal endurrinda teimum eitthvørt krav, tap, endurgjald ella ábyrgd annars, sum stendst av ella er í samband við eina og hvørja gerð og/ella undanlát hjá keypara ella hansara starvsfólkum, manning, agentum, umboðum ella øðrum, ið virka í keyparans navni í sambandi við Veiting av Olju, sum hesar Almennu Treytirnar eru galdandi fyri.

## 9. GJALD

Uttan so at myndugleikaásetingar áseta nakað annað, hevur Seljari rætt til at senda faktura til keypara fyri veiting av Olju við teldubrævi við veitingardetaljum ístaðin fyri við veruligum veitingarskjølum. Veitingarskjøl kunnu verða útflýggjað keyparanum, um keyparin biður um hetta, men keyparin kann ikki treytað gjalding av, at hann móttekur slík veitingarskjøl.

Uttan so at annað er avtalað skrivliga, skal gjalding fara fram av keyparanum ella vegna keyparan í donskum krónum uttan avsláttur, niðurskurð ella mótrokning, og sambært Cash on Delivery afturímóti faktura frá Seljara ela Veitara. Gjalding fer fram við bankaflyting, sum Seljari ávísur, fyri hvørja Veiting sær til eitt skip, tá ein Veiting er bíløgd av keyparanum ella vegna keyparan.

Seljari tilskilar sær rættin til at broyta ella taka av kredittavtalur við at fráboða slíka broyting til keypara, og ístaðin at krevja gjald fyri Oljuna beinanvegin fyri longu leveraða Olju, og gjald frammanundan ella aðra fíggjarliga trygd fyri framtíðar Veitingar, herundir fyri Veitingar, sum longu er bílagdar. Seljarin tilskilar sær eisini rættin til at krevja rentu fyri ov seina gjalding sambært tí til eina og hvørja tíð í Føroyum galdandi rentulóg frá gjaldkomudegi til goldið verður.

Gjalding verður mett at vera framd, tá pengar eru tøkir á Seljarans bankakontu í bankanum, sum upplýstur er fyri keyparanum. Um gjaldkomudagur er á einum degi, tá bankin ikki er opin, verður gjalding mett at vera framd á tí gerandisdegi, sum er tættast við gjaldkomudagin. Um tættasti dagur við gjaldkomudagin bæði er áðrenn og aftaná gjaldkomudagin, skal gjalding vera framd tættasta gerandisdagin áðrenn gjaldkomudagin.

## 10. KRØV

Rætturin hjá keypara til at seta fram krøv í sambandi við eina veiting íroknað, men ikki avmarkað til krøv í sambandi við nøgd, dygd og prís, er treytað av, at skrivlig fráboðan verður givin Seljara beinanvegin eftir, at keyparin er vorðin varugur við, at hann hevur eitt krav, og ongantíð seinni enn 30 dagar eftir, at veitingin er farin fram. At Keypari setur fram eitthvørt krav, sleppur honum ikki undan skylduni at gjalda fult gjald, eins og kravt er í § 9 í hesum Almennu Treytunum. Krøv viðvíkjandi dygd skulu byggja á royndir, sum eru gjørdar skjótast tilber av eini óheftari rannsóknarstovu, og eru tiknar í sambandi við veitingina, antin frá tanganum á landi ella tangabilinum, sum hevur veitt Oljuna. Um eitthvørt krav, sum keypari hevur sett fram í nóg góðari tíð ikki sambært keypara verður gingið nøktandi á møti, fyrnast eitthvørt rættarkrav orsakað av hesum kravi uttan so, at stevning er innlatin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at viðkomandi Olja var veitt, ella eftir, at viðkomandi hending, manglandi hending, ella annað, sum kravið stavar frá, fór fram.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

Hendan áseting skal halda fram við at vera í gildi eisini eftir, at einhvør avtala millum Seljara og Veitara einumegin og keyparan hinumegin er farin úr gildi.

### 11. INNHEINTING

Veiting av Olju sambært hesum Almennu Treytum er ikki einans gjørd í góðari trúgv mótvegis keypara, men eisini í góðari trúgv mótvegis tí skipi, sum skal nýta Oljuna, og tað verður hervið avtalað, at Seljari og Veitari fáa og kunnu gjøgnumtvinga sjóveð móti viðkomandi skipi fyri upphæddina svarandi til prísin á veittu Oljuni. Allar útreiðslur í sambandi við arrest av skipinum skulu vera fyri keyparans rokning. Um neyðugt er hjá Seljara ella Veitara at taka onnur stig, skal hetta ikki skiljast sum, at Seljari ella Veitari frásiga sær rættin til nevnda veð.

### 12. FORCE MAJEURE

Um antin Seljari, Veitari ella keypari ikki heldur sínar skyldur í sambandi við eina Veiting ella annars ikki ger tað, ið kravt er av honum í sambandi við eina Veiting sambært hesum Almennu Treytunum ella sambært einihvørjari avtalu millum Partarnar, og hetta hevur við sær eitt krav móti viðkomandi parti, ella hetta verður mett sum avtalubrot, kann viðkomandi partur ikki verða ábyrgdaður fyri hetta, um orsøkirnar til hetta eru uttanfyri ávirkanina hjá viðkomandi parti, sum t.d. orsakað av arbeiðsósemjum, verkfalli, farsóttum, myndugleika-uppíblanding, terroratsóknum ella øðrum orsøkum, sum eru ásettar í lóg. Keypari hevur tó ongantíð rætt til at sleppa sær undan síni skyldu til at gjalda allar upphæddir, sum eru falnar fyri Olju, sum er veitt.

Ein partur, sum verður raktur av hendingum, sum eru nevndar í hesi grein, skal geva hinum partinum nágreiniliga skrivliga frágreiðing við eini meting av, nær viðkomandi forðing er av.

### 13. TROT Á OLJU

Um onkur av teimum hendingum, sum eru nevndar í grein 12, ella um aðrar hendingar, sum vóru væntandi ella vóru óvæntaðar, herundir avtalurættarligar broytingar, sum hava samband við Veiting av ráðolju ella oljuúrdráttum, sum Oljan av tí slagnum, sum skuldi verið seld sambært hesum Almennu Treytunum, verður útvunnin frá, um útboðið av Olju verður avmarkað, ella um Olja bara er tøk til Seljara ella Veitara undir treytum, sum Seljari og Veitari eftir egnum metingum meta ikki vera nøktandi, kann Seljarin frítt sjálvur gera av, hvussu nógva Olju hann vil veita keypara og/ella øðrum kundum Seljarans ella Veitarans, og Seljarin og Veitarin hava í slíkum førum ikki skyldu til at økja útboð sítt frá øðrum veitarum hjá Seljaranum og/ella Veitaranum til at koma ístaðin fyri Oljuna, sum á hendan hátt ikki kann veitast.

Ongin av pørtunum, sum verður ávirkaður av orsøkunum, sum eru nevndar í greinunum 12 og 13 í hesum Almennu Treytunum skal hava skyldu til at beina burtur hesar orsøkirnar, um tað viðførir eykaútreiðslur at gera tað. Hvørki Seljari ella Veitari skulu hava nakra skyldu til at keypa eyka nøgdir av Olju ella seinni at veita Veitingar, sum vóru strikaðar í tíðarskeiðinum, tá ikki bar til at fremja Veitingina.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

KRAFTA energy



**14. UMHVØRVISVERND**

Um ein oljuleki hendir, meðan Olja verður veitt keyparanum sambært hesum Almennu Treytunum, skal keyparin beinanvegin gera tað, sum eftur umstøðunum er neyðugt og/ella er kravt sambært lóg fyri at taka upp Oljuna og verja móti avleiðingunum av oljulekanum. Óansæð orsøkina til ein slíkan oljuleka vera Seljari og/ella Veitarin hervið heimilaðir, tá teir meta vera neyðugt, eftir at hava fráboðað keypara um hetta, at gera tað, antin einsamallir ella saman við keypara, sum teir meta vera neyðugt, herundir at átaka sær slíkar útreiðslur fyri at taka upp Oljuna og at sleppa undan avleiðingunum av oljulekanum.

Um Seljari ella Veitari hava nýtt sín rætt til at taka upp Oljuna, og harvið at sleppa undan avleiðingunum av oljulekanum, váttar keyparin at vilja samstarva og koma við slíkari hjálp, sum er neyðug hjá Seljara og Veitara í sambandi við slíka upptøku. Einhvør útreiðsla, endurgjald, kostnaður, bót og annað, sum stavar frá lekanum, skal vera goldin av tí partinum, sum hevur skylduna og ábyrgdina av lekanum, og einhvør útreiðsla ella kostnaður í sambandi við upptøku av oljuleka skal verða býtt millum partarnar í sama lutfalli, sum partarnir hava ábyrgdina av lekanum. Allir partar vátta at vilja halda hinar partarnar skaðafríar fyri allar útreiðslur, útlegg og/ella kostnaðir, sum teir sambært hesi grein hava skyldu til at endurrinda viðkomandi parti.

Keyparin váttar eisini at vilja geva Seljara ella Veitara øll slík skjøl og allar aðrar upplýsingar viðvíkjandi lekanum, sum Seljarin ella Veitarin hava tørv á, ella sum kravd eru sambært lóggávuni ella viðkomandi reglum.

**15. LÓGARVAL OG VERNDARTING**

Um annað ikki er avtalað millum partarnar verða hesar Almennu Treytirnar og allar avtalur, sum Almennu Treytirnar gerast ein partur av, fevndar av føroyskum rætti. Hetta skal tó ikki forða Seljaranum í at krevja sjóveð í einumhvørjum viðkomandi rættarøki. Eitthvørt rættarmál í hesum sambandi verður at føra við Føroya rætt.

The United Nations Convention on Contracts for the International Sale of Goods er ikki galdandi.

**16. UPPSØGN**

Seljari hevur rætt til at uppsiga avtaluna við keyparan, um keyparin fremur týðandi brot (herundir væntað brot) av einihvørjari treyt ella skyldu í avtaluni ella í hesum Almennu Treytunum, og/ella um keyparin verður hóttur við ella er í gongd við eina likvidatión ella konkurs.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo

## 17. AÐRAR ÁSETINGAR

(a) Fráboðanir til Seljaran skulu sendast til bústaðin, sum er nevndur ovast í hesum Almennu Treytunum. Um annað ikki er fráboðað Seljara skrivliga, skulu fráboðanir sambært hesum Almennu Treytunum sendast til keypara á bústaðin, sum keypari hevur víst á í sambandi við fakturering. Báðir partar kunnu broyta bústað sín við at geva fráboðan um hetta 15 dagar frammanundan við teldubrævi.

(b) Um annar av pørtunum velur ikki at gera brot á avtaluna ella skyldu hjá mótpartinum galdandi, skal hetta ikki skiljast sum, at viðkomandi partur heldur ikki kann gera framtíðar brot hjá mótpartinum galdandi.

(c) Keypari hevur ikki rætt til at avhenda síni rættindi ella skyldur sambært hesi avtalu til nakran annan uttan skrivligt loyvi frá Seljara frammanundan.

(d) Hvørgin av pørtunum kann seta nakað krav fram fyri nakað óbeinleiðis tap, serligt tap, ella onnur líknandi tap, herundir miss av vinningi ella onnur óbeinleiðis ella avleidd tap.

(e) Seljarin gevur ikki við hesum Almennu Treytunum nakað garanti fyri nakrari serligari fremjan av veitingum sínum annað enn tær veitingar, ið Seljarin ella Veitarin vanliga veita í sambandi við veiting av Olju.

(f) Hesar Almennu Treytirnar innihalda allar avtalurnar millum partarnar, tá tað snýr seg um tey viðurskifti, ið her eru umrødd, og Seljarin gevur í hesum sambandi ikki aðrar váttanir, garanti ella annað enn tað, ið framgongur av hesum Almennu Treytunum. Hesar Almennu Treytirnar kunnu ikki verða broyttar, uttan tað er gjørt skrivliga millum báðar partar.

(g) Um ein bílegging verður framd av einum umboði fyri keyparan sambært hesum Almennu Treytunum, ábyrgdast hetta umboðið ikki einans sum umboð, men eisini fyri allar tær gerðir og allar skyldurnar, sum keypari hevur ella hevði havt.

**Krafta Energy**

Áarvegur 14, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 333 888
info@krafta.fo
www.krafta.fo